Landssjúkrahúsið



# Tympanoplastik/ Myringoplastik

Leiðbeining
við oyrnaskurðviðgerð

NB! Undan skurðviðgerðina skal oyrað vera turt. Rennur úr oyranum, skalt tú seta teg í samband við Oyrna-nasa-háls-deildina alt fyri eitt.
Gongst eftir ætlan, verða tygum vanliga útskrivað/ur dagin eftir skurðviðgerðina.

## Kvøldið fyri skurðviðgerðina skalt tú fasta:

Kravið viðvíkjandi at fasta er: Barnið kann eta, tó ikki mjólkaúrdrátt, í seinasta lagi 4 tímar undan skurðviðgerðini. Børn, ið bert fáa bróstamjólk, kunnu í seinasta lagi fáa at súgva 4 tímar undan skurðviðgerð.



## Ásetta dagin møtir tú vanliga kl. 07:30 á deildini.

## Fyrireikingar á deildini

Hárið verður rakað burtur 1-2 cm oman fyri oyrað. Tablettir, tilráddar av narkosulækna, verða givnar. Børn fáa EMLA-plástur (lokaldoyvandi) á handabakið. Skurðviðgerðin fer fram fyrrapart.
Undir skurðviðgerðini skalt tú ikki hava neglalakk á. Heldur ikki hava ringar, hálsprýði ella tílíkt. Langt hár skal vera bundið upp. Skurðviðgerðin fer fram í fullari doyving og varar í 1-1½ tíma. Av skurðgongini kemur tú í viðrakning, har fólk eru um teg, til tú ert heilt vaking ov verður koyrd/ur aftur á deildina. (Annað av foreldrunum er ið barninum inni á viðrakningini).

## Aftaná skurðviðgerðina

Í skurðviðgjørda oyranum liggur tvørra (gaze-strimmul við salvu). Hendan skal liggja í oyranum í 3 vikur. Hetta tíðarskeið hoyra tygum tí lítið og einki við oyranum. Sigið frá, um tværran dettur úr í úrtíð! Annað umvav er ikki.
Um tygum hava pínu í oyranum aftaná skurðviðgerðina, verður mælt til at nýta Panodil.
Annars fylgir vanliga lítil og eingin pína við skurðviðgerðini. Um nógv pína ella fepur kemur fyrstu dagarnar aftaná skurðviðgerðina, set teg so í samband við deildina tel. 304510.

## Treytir fyri at røkka besta úrslitinum aftaná skurðviðgeðrina



- Vatn má ikki koma í viðgjørda oyrað, ársaka av vanda fyri bruna; tí er gott, um tú fært hjálp at vaska hárið fyrstu tíðina.
- Bíða við svimjing í 2 mánaðar, tá skuldi oyrað verið lekt.
- Ikki snýsa tær ella njósa fyrstu 3 vikurnar aftaná skurðviðgerðina, tí hetta økir um trýstið í oyranum. Verður tú noydd at njósa, so opna munnin samstundis.
- Ikki gera fimleik ella annan ítrótt fyrstu 3 vikurnar. Ikki lyfta tungt.
  Skulu tygum av landinum flogvegis, ráðfør teg við oyrnalæknan fyrst.

## Eftirkanning hjá oyrnalæknanum

Fyrsta kanningin hjá oyrnalæknanum er 3 vikur aftaná skurðviðgerðina, og tá verður tvørran tikin úr oyranum. Onnur kanningin er 1 mánaða seinni, tvs. 7 vikur aftaná skurðviðgerðina. Tá verður hoyriroynd gjørd. Læknin tekur støðu til, um neyðugt er við fleiri eftirkanningum.

## Sjúkramelding

Vanliga upp til 1 mánaða.

## Skúli



Er talan um eitt ban/skúlanæming, er eingin forðing fyri at farið veðrur aftur í skúla mánadagin aftaná skurðviðgerðina.

Starvsfólkið á Oyrna-nasa-hálsdeildini

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.lsh.fo